# Oysa av tí keldu sum

**Norðurlandahúsið, stjóri og starvsfólk, mentafólk, listafólk, vinnulívsfólk, norðurlendskir gestir og hyggjarar í sjónvarpinum feiraðu 25 ára hátíðarhaldið hjá Norðurlandahúsinum fríggjkvøldið 9. mai. Ein hátíðarveitsla við spríkjandi hyper modernaðum og djúpt rótfestum ingrediensum. Sum verturin Sjúrður Skaale segði: Vit OYSA av tí keldu, sum føroysk mentan er**



HÁTÍÐARHALD

*Gunnvá Zacharisen*
*gunnvaz@hotmail.com*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinnapartin fríggjadagin, áðrenn sjálva gallaframførsluna, varð hátíðarhald av nýggju athøllini hjá Norðurlandahúsinum, nevnd stutt og greitt Athøll.

Eg traðki inn í eitt ljóst fýrkantað rúm, ráir ljósir betongveggir, trægólv, dagsljós úr gluggunum úr erva allan vegin runt og fýra træsúlur. Sera snotuligt og eg fái bert eina forlongda kenslu av tí, sum eg altíð kenni, tá eg traðki inn Norðurlandahúsið: Her kenni eg meg væl, tað ráa og ta bleyta í fullkomnari harmoni. Svanareiðrið hjá arkitektinum Ola Steen hevur nú fingið eitt vakurt og hugtakandi hjá-reiður. Vónandi fara nógv spennandi egg at klekjast her inni eisini.

### Víðkaðir karmar

Í hesum ljósa rúmi flutti løgmaður Jóannes Eidesgaard fram røðu, har hann fegnaðist um nýggja bygningin, sum fer at koma øllum Føroyum til góðar – mentafólki, listafólki og vinnulívsfólki og ikki minst er Athøllin ein vælegnaður karmur at bjóða gestum uttaneftir at hava forkunnugar ráðstevnur. Føroyar eru veruliga ein partur av alheimsgerðini, og Athøllin er ein neyðugur og umráðindi karmur í hesi tilgongd, endaði løgmaður sína røðu.

Síðan vóru aðrir gestir, sum fluttu fram røðu: Vagn Steen Olsen, umboð fyri Nordisk Minister Råd, sum fegnaðist um mongu mentanarligu tilboðini og ríka listalívið, sum er í Føroyum og sum Norðurlandahúsinum hevur verið við til at skapa karmarnar fyri. Kjarnuøkið hjá Norðurlandahúsinum, sum er mentan fyrst og fremst, er nú við hesi nýggju Athøll víðkað til eisini at umfata onnur øki.

Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen helt eisini røðu og fegnaðist m. a. um, at hóast veðrið, sum vit ikki kunnu gera nakað við, so er ein ørgrynna av møguleikum í Føroyum, og at hesin nýggi bygningur veruliga hevur sett Havnina á kortið sum norðurlendskur ráðstevnubýur.

Umboð fyri A.P. Möller og Chastine Mc-Kinney Möllers grunni, sum hevur stuðlað byggingini av Athøllini, segði eisini nøkur orð, umframt svenski ráðharrin fyri norðurlendskt samstarv Kristina H. Persson, sum rósti tí sterku støðu, sum mentanarlívið hevur í Føroyum og vónaði, at Norðurlandahúsið við Athøllini fer at taka eitt sentralt pláss í norðurlendskum mentanarlívi í framtíðini. Athøllin avspeglar eina styrking í norðurlendskum samstarvi og ein vilja at ganga nýggjar leiðir, endaði svenski Norden-ráðharrin sína heilsu til Norðurlandahúsið.

### Stjóra frámerkið

Aðal-endamálið hjá Norðurlandahúsinum, sum er at skapa karmar fyri mentanartiltøkum í Føroyum, at sjónliggera føroyska mentan og list í Norðurlondum og at flyta norðurlendska mentan og list til Føroyar, tykist nu við Athøllini av álvara at verða víðkað til eisini at umfata ráðstevnur, vinnulív, fundarvirksemi. Allir stjórar hjá Norðurlandahúsinum hava á hvør sín hátt sett sítt frámerki á húsið, summir meira sjónliga enn aðrir. Kanska er tað hetta frámerki, sum núverandi stjóri Niels Halm, sum eftir mínum tykki ikki er í tí sjónliga endanum, hevur sett: At skapa Norðurlandahúsið til ein modernaðan og forkunnugan ráðstevnu-depil mitt í Norður Atlantshavi. Tað er at gleðast um, hóast eg vóni og bíði til, at tað framhaldandi fer at verða mentanin og listirnar og ikki ráðstevnurnar fyri pengasterkar fyritøkur, sum fara at traðka høvuðssporini í Norðurlandahúsinum í framtíðini.

### Eitt rúm fyri samtalu

Eyðun Andreassen, fólkalívsfrøðingur helt síðan áhugaverda røðu. Nakrar hugleiðingar um rúmið, anneksið, supplementið, athøllina. Norðurlandahúsið, áðrenn Athøllina, er eitt stað, har tankin er móttøka. At taka ímóti. At lurta og síggja. Konsertsalurin, Dansisstovan, Klingran er hugsað sum ein einvegis samtala. Eitt rúm fyri einarøðu, monologi. Tann upptraðkandi er á palli og áskoðarnir sita sum so óvirknir og móttaka frá pallinum, klappa, fara síðan lágmæltir út í foyéruna, nikka høfliga, men ytra seg ikki opið og alment um tað, ið upplivað er. Ein kontemplativ útfoldelse, sum manifesterar seg inni í áskoðaranum í langa tíð eftir sjálvt upplivilsið.

Við Athøllini er tankin dialogur. Samrøða. At verða saman um at úttrykkja seg, skapa innlit, lurta, síggja og tala, flyta verðina ella seg sjálvan. Eyðun setti spurngartekin við, um vit í alheimsgjørdu samrøðuni hava gloymt kynstrið at lurta? Hóast verðin er hátøknifrøðilig duga vit enn veruliga at lurta?

### Menniskjatemjarar í okkara tíð

Eyðun fór víðari heilt aftur til Platon og sjálvt hugtakið um retorikkin. Platon dámdi illa tað, hann sá í síni samtíð, serliga retorikkin í síni samtíð. Platon vildi verða við, at hesin 'talemagerkunstur', sum sofistarnir nýttu, var ein vandamikil undirdeild av trøllakynstri - líkt slangutemjarunum á gøtuni. Hesir vóru menniskja-temjarar. Og –hugleiddi Eyðun- at menniskjatemjarnir í okkara tíð mundu verða at líkna við teir óteljandi samskiftisráðgevarnar og lýsingainformasjónin annars, sum florerar í okkara samtíð. Eyðun vónar og ynskir, at tað ikki verður ta slagi av samrøðu, sum verður í hesum rúmi, Athøllini. Men at høllin verður nýtt sum pallur, har samrøða verður millum líkaverdug menniskju. Kanska skulu vit lata okkum íblásast av Sokrates, sum gekk á gøtuni og avbjóðaði til samrøðu, bað menniskju siga sína hugsan, veruliga at SAMrøða. Við tí úrsliti at okkurt flytist, antin verðin ella ein sjálv/ur, ella bæði tvey.

Eyðun endaði við einum citatið hjá norskum yrkjara, Arnold Øverland: "Du må ikke bedrive ord" og vónaði at Athøllini den grad fór at bedríva orð. Nógv orð!!

### Ein vifta av listarligum fýrverki

Í konsertsalinum, sum húsar eini 400 áskoðarar, varð nú fullsett av veitslukløddum gestum. Myndatólini hjá Kringvarpinum sett í vinkul og pallurin skryddur, vertirnir til reiðar og listafólkini, sum skuldu geva sítt ískoyti til føðingardagsbarnið klár handan pall. Og tað vóru eisini tveir vælupplagdir vertir Jensina Olsen og Sjúrður Skaale, sum